LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvorjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.
tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

BMW 316i
til sølu, árg. 8/95, koyrt 125.000 km, nýsproytaður, svartur, í sera góðum standi.
Tlf. 361376 ella 219376

DEKK TIL SØLU
4 pikadekk – HanKook – 185/65/14 og 4 Fulda heilársdekk – 185/65/14. Dekkini eru á lættmetallfelgum.
Tlf. 313365

TIL SØLU
Eykalutir til VW Golf aug. 83-92, plátudeilir felgur o.a.
Tlf. 456277

GOLF 1.3
árg. 91, koyrt 146.000 km, til sølu. 4 stk. Pirelli dekk 195/50 R15 við alu-felgum fylgja við.
Tlf. 210425

SUMMARDEKK
4 summardekk stødd R13 175/70 brúkt eitt summar – til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 441688 ella 211688

BMW 318 Ti
við tveimum hurðum, sportfelgum og diskspælara til sølu.
Tlf. 457300 ella 217370

GER EITT GOTT BILKEYP
Opel Astra G. st. vognur 2.0, turbodiesel, sera væl viðfarin, selist vegna keyp av størri bili. Bilurin er 2 ár og 4 mðr., er sum nýggjur. Selist fyri einans145.000 kr. ella hægsta boð yvir. Nýprísur var 205.000 kr.
Tlf. 315543 ella 224386

MITSUBISHI GALANT 2.5
V6, árg. 2000, koyrt 29.000 km, el-rútar, aut. gear + manuel og eyka dekk á felgum. Til sølu um nóg høgt boð fæst
tlf. 456007

SUMMARDEKK
4 Vredestein summardekk 155 x R13 á felgum. Passa til Ford Escort. Til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 310918

FELGUR TIL SØLU
13" felgur til sølu – 4 stk. aluminiumsfelgur v/ dekkum til sølu fyri 1500 kr. Holdiametur 4 x 100.
Tlf. 220043 eftir kl. 17

MITSUBISHI PAJERO
Ein Mitsubishi Pajero 4x4 2.3 T.D, hevur setur aftan og ein rúgva av eykalutum fylgja við. Til sølu fyri 13.000 kr.
Tlf. 211543, best eftir kl. 15.30

FORD ESCORT TIL SØLU
Ford Escort 1,8 D, árg 91. til sølu. Motorurin er í ólagi.Prísuppskot 3000,-
Tel. 226662

NISSAN BLUEBIRD 1.8 SGX T
Nissan Bluebird 1.8 SGX Turbo árg. 89 til sølu fyri kr. 17.500,- Bilurin er nýsýnaður, og hevur t.d. cruise control, aut. rútar, servost., fløguspælara. Nýggja kobling.
Tel. 223454

TOYOTA COROLLA
Grønur Toyota Corolla 2,0 D.XL frá 11/91 til sølu, um hóskandi boð fæst. Hann er sýnaður í nov. 2001. Har fylgja sportfelgur + dekk við.
Tlf. 320540 aftaná kl.18.00 ella 222156

TIL SØLU
Toyota Carina E 1.8 GLI til sølu. Skrásettur fyrstu ferð 96.10. Hevur koyrt 72.000 km. 15" Alufelgur við góðum dekkum, umframt 4 góð heilársdekk á felgum. Hevur El-rútar, el-spegl og sentrallás. Er í góðum standi.
Tlf. 264767

GOLF
turbo diesel, árg. 10/89, til sølu.
Tlf. 316162 ella 215555

HONDA ACCORD 1.8i
Honda Accord 1.8i, árg. 97, km. 66.000, vælhildin, ikki roykjari, prísur 117.000. Mini Disc og CD-spælari kann møguliga fylgja við.
Tlf. 455786

YNSKIST
Sleipikrókur ynskist til Hyunday Galopper.
Tlf. 333219 ella 260019

SPORTSFELGUR
á dekkum til sølu. Fýra orginalar Toyota alu. sportfelgur á dekkum til sølu fyri einans 4.500,- Nýprísur er eini 8.800,- Dekkini eru brúkt í eitt hálvt ár, dekkini eru av merkinum »Michelin 195/65 R14 89T MXT«. Felgurnar eru til 5 hol.
Tlf. 218099

FORD ESCORT 1.6
árg. 7/97, 5 hurðar, til sølu. Bilurin er í góðum standi.
Tlf. 316814 ella 223366

VW GOLF 1.8GT
árg. 89, 3 h. koyrt 108.000 km, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 218778

SUMMARDEKK
Fýra summardekk á felgum stødd 165/70 13" til Opel Ascona.
Tlf. 333219

OPEL ASCONA 1.6S
4 hurðar, árg. 88, sóltak. Sýnaður í mai 2001. Koyrt 146.000 km. Ikki er roykt í bilinum. Bilurin er í hampuligum standi. Kostnaður 8.000 kr. Radio við cd-spælara fylgir við.
Tlf. 333219

FORD FIESTA 1.1
Ein reyður Ford Fiesta 1.1. til sølu, árg. 87, hevur cd-spælara.
Tlf. 316813 e. kl. 18

MAZDA 323 1.6
árg. 90, til sølu fyri 35.000 kr. sær sera gott út og er í sera góðum standi.
Tlf. 227781

OPEL ASCONA 1.6
Opel Ascona 1,6 diesel árg. 87 bíliga til sølu. Er í góðum standi. Hevur 15" sportfelgur. Motorurin akkurát umvældur. Bilurin hevur nógvar nýggjar deilir. Prísin tosa vit um.
Tlf. 256900

TOYOTA COROLLA 2.0
til sølu, árg. 9/99, 89.000 km. 16" sportfelgur, pikadekk á felgum.
Tlf. 421317 ella 211317

TOYOTA COROLLA
árg. 95 til sølu. Bilurin hevur el-sóltak, eyka sett av felgum og tokulyktir framman.
Tlf. 216100

TOYOTA CARINA II
T151, Liftback, árg. 87, sum eykalutir við góðum ,motori, hurðar o.a.
Tlf. 228347

PEUGEOT 106 XS
árg. 97, til sølu fyri 58.000 kr. Hevur koyrt 82.000 km.
Tlf. 319515

BMW 320i
árg. 84, koyrt 160.000 km, í góðum standi, v/ spoilarasetti, bíliga til sølu.
Tlf. 317332 ella 243446

SUMMARDEKK TIL SØLU
Tvey lítið brúkt summardekk Bridgestone 175/70 R14, B330 84T til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 318269

DEKK TIL SØLU
Fýra nýggj Continental summardekk st. 195/55. R15 til sølu.
Ringið tlf. 317656 e. kl. 18

DAIHATSU CHARMANT
árg. 87 til sølu sum eykalutur.
Tlf. 441199

OPEL CALIBRA
turbo, 204 HK. toppferð 240 kmt. 0.100 km 6.7 sek. leður sportsetur við hita í. El-rútar. hevur koyrt 114.000 km.
Tlf. 227568

TIL SØLU
Toyota Corolla, árg. 95 til sølu. Bilurin hevur el-sóltak, eyka sett av felgum og tokulyktir framman.
Tlf. 216100

BMW 52.5
Turbo Diesel í góðum standi til sølu. Kom og hygg og royn bilin. Prísin tosa vit um. Ring
Tlf. 256078

OPEL KADET
Vøruvognur í góðum standi til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 424356/281305

TIL SØLU
Toyota Corolla frá 1989, koyrt 105.000 km, er í góðum standi, til sølu fyri 12.000 kr. Ring
Tlf. 284142/321142

TIL SØLU
Ford Sierra 2.0 stw., árg. 88. Hevur avhendingarkrók. Sýnaður 5/01. Er í góðum standi.
Tlf. 255754

BILAR TIL SØLU
Toyota Corolla '86 bíliga til sølu. Ford Escort '86 bíliga til sølu.
Tlf. 314465/253443

TIL SØLU
Mazda 626 2.0D, 1987, koyrt 170.000 km. Nýsýnaður 9. nov 2001 + Mazda 626 83-87 sum eykalutir.
Tlf. 313824/222241 best eftir kl. 17.00

TIL SØLU
205/50-15 sportfelgur - CD6000 RDS, Nokia 3330 við bilsetti, 350W Sobbur við 1x100W forsterkara, alt til sølu fyri 10.000 kr., til Ford bilar. Ring aftaná kl. 18.00.
Tlf. 251716

SCANIA 82H
Ein Scania 82H, 4x2 við 11 tons krana og skiftilast. Sýnaður í des. 2001 til sølu.
Tlf. 213195 ella 444642

TIL SØLU
4 óbrúkt summardekk av merkinum Michelin Energy, stødd 195/65-R15 til sølu.
Tlf. 252971

VW GOLF 1,8
Árg. 88, 5H til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 218778

TIL SØLU
Daihatsu Charade, nýsýnaður bíliga til søu.
Tlf. 361372

TIL SØLU
Ein lastbilur, Toyota Hilux, til sølu. Bilurin er frá 1991.
Tlf. 218158/318158

TIL SØLU
Pajero 4x4 í góðum standi. Nógvir eykalutir , nýggj dekk og bremsur til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 422241/264469

TIL SØLU
Kølari og kobling til Mazda 323, árg. 87, óbrúkt, bíliga til sølu. Ring
Tlf. 224259

TIL SØLU
Stoytdoyvarar til Maza 323, árg. 87. Ring
Tlf. 224259

DEKK TIL SØLU
Fýra lítið slitin summardekk, stødd 185/60-R14 til sølu fyri 1.300 kr.
Tlf. 210686

TIL SØLU
DAEWOO Nubira st. car 2,0 s/x bíliga til sølu, árg. febr. 2000, hevur el-spegl og el-rútar. Pikadekk fylgja við. Ring á
tlf. 213737

FORD PUMA
Til sølu, árg. 2000, koyrt 7.000 km. Lítið brúktur og sær út sum nýggjur.
Tlf. 264928

BILUR YNSKIST
Japanari árg. 92-95, ynskist til keyps fyri sámuligan pris.
Tlf. 224910

FORD ESCORT 16V
árg. 95, í sera góðum standi til sølu um hóskandi boð fæst.
312519/212519

Arbeiði

TILBOÐ YNSKIST
at klippa runnar í urtagarðinum.
Tlf. 444665

VIT SØKJA
eftir tilkomnari kvinnu til vaskiarbeiði 1 ferð um vikuna.
Tlf. 315494

ARBEIÐI YNSKIST
Eg eri ein røsk og álítandi 18 ára gomul genta, ið søkir eftir onkrum arbeiði. Helst í Havn.
Tlf. 254743, Elsebeth

SØKT VERÐUR
eftir fólki at vaska umborð á Norrønu, meðan hon liggur á Havnini (3 ferðir um vikuna) meðan summarsiglingin er.
Ring 215121 eftir kl. 18

HÚSINI MÁLAÐI?
Vilt tú hava húsini máladi innan ella uttan? Ella vilt tú hava garasjuna, bátin ella annað málað? So ring til min og avtala tíð, eg átaki mær alt vanligt málaraarbeiði.
Tlf. 262057 ella 265044

KVINNA SØKIST
Kvinna søkist til reingerð einaferð um vikuna.
Tlf. 313701

YNSKIR KJANS VIÐ SKIPI
26 ára gamal jávari/føroyingur, raskur, álítandi og tolin, vanur við psykist útiarbeiði.
Tór sími 264339

YNSKJA ARBEIÐI
Vit eru tvær 14-15 ára gamlar gentur, sum ynskja arbeiði aftaná skúlatíð til lættari reingerð ella at passa børn í Runavíkar kommunu.
Tlf. 441435

Barnaansing

EG ERI
Eg eri ein 15 mðr. gamal drongur, sum søknast eftir einari fittari gentu/konu at ansa mær gerandisdagar, frá kl 8.00 til kl uml. 15.00, at byrja skjótast møguligt og fram til summarfrítíðina. Ert tú áhugað, kanst tú ringja á
tlf. 319855 ella 219855

ER NAKAR,
sum kann ansa soni okkara, sum er 12 mán. Møguleiki er fyri at ansa honum heima hjá okkum.
Tlf. 227469 ella 315623

Barnaútgerð

SILVER CROSS BARNAVOGNUR
Myrkabláur við blomstrum á síðuni fyri 2500 kr.
Tlf. 455907

BARNAKOYRISTÓLUR
Gráur barnakoyristólur til sølu.
Tlf. 319897

TIL SØLU
Pusliborð við baðikari, 2 hillum og hjólum til sølu fyri kr. 500 kr.
Tlf. 316817 eftir kl. 18

BARNAVOGNUR TIL SØLU
1 ára gamal barnavognur við babylift, tasku, regnslag og fluguneti til sølu fyri 1.500 kr. Nýprísur 2.850 kr. Lítið brúktur.
Tlf. 443263 Tove

TIL SØLU
Babylyftin, blá og vælhildin, botnur, madrassa og betrekk fylgja við, til sølu fyri 300 kr. Sum nýggj ammipúta til sølu fyri 100 kr. Verður selt saman ella hvør sær.
Tlf. 314624 ella 215353

TIL SØLU
Gráur Brio barnavognur v/ babylyft og systkinasetri 1.000 kr. Rimasong, ljóst træ, flytbarur botnur 500 kr.
Tlf. 371474 aftaná kl. 16.00

Bátaútgerð

VHF'UR YNSKIST
VHF'ur ynskist til keyps. Hevur nakar ein biligan, brúktan VHF at selja mær.
Tel. 320133

KAPPRÓÐRARBÁTUR TIL SØLU
Keyp met vinnandi 6-mannafar. Jarnbardur er bygdur av Hanus Jensen í 1990. Mynd á www.krf.fo undir tíðindi – 30 tey seinastu. Hoyr meir á
tlf. 310055 ella 250118.
jannie.d@hotmail.dk

VATNSKUTARI TIL SØLU
Merki: Kawazaki ZXi. Motorur: 120 HK. Litur: Gulur + hvítur. árg. 98.
Tlf. 211911

TIL SØLU
Ein Saab diesel, 18 - 22 hk, í góðum standi. Aksil, skrúva og stevnurør fylgir við.
Tlf. 211054

TIL SØLU
Neyst til sølu á Bakka í Vági.
Tlf. 373054

BÁTUR YNSKIST
til keyps. 17 til 21 fót. Alt hevur áhuga.
Tlf. 222602

TIL SØLU
10-mannafar við fiskiloyvi til sølu.
Tlf. 214032

TIL SØLU
Ein neystagrund og spæl til sølu í Vági.
Tlf. 373997

MOTORUR TIL SØLU
Ford Dolphin 120 hk. Borg-Warner gear, AS7-73G, 2:1. Í góðum standi.
Tlf. 318286 ella 218286

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Bræðvaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á miðdegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

Bingo

BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum hósdagin 18. apríl kl. 19.00. 15 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Full pláta 400 kr. 6.-12. spæl 500 kr. 15 vinningar á lutaseðli. Eykaspæl. Koyring heim.
Argja Róðrarfelag

GOTT BINGO
verður í Eydnuni Dýra biðidag kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Á lutaseðli gávukort frá Smyril Line á 2.000 kr. Drigið verður millum spølini.
Sunda Róðrarfelag

EYDNUHJÓL
Eydnuhjól verður í Kunoy 4. mai. Tey, ið vilja stuðla við lutum, kunnu venda sær til ein av nevndarlimunum.
Bygdarfelagið Vesturskin

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánakvøldið 22. apríl kl. 19. 15 plátur 100 kr. Koyring heim aftaná. 15 vinningar á lutaseðli. Høvuðsvinningur: Vikuskiftis flogferð.
Astma- & Allergifelagið

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í skúlahøllini í Trongisvági tórskvøldið 18. apríl kl. 19. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1 harmonikuferð við Norrønu. Hvørt bingo gávukort á kr. 300.
Tvøroyrar svimjifelag

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini onskvøldið 24. apríl kl. 19.30. Hvørt bingo gávukort á kr. 300. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1 harmonikuferð við Norrønu
Kirkjukórið Ljómur

OYGGJABINGO
Hey suðuroyingar. Rimmar oyggjabingo verður í skúlahøllini mánakvøldið 29/04 kl. 19.00. Full pláta 500 kr. og annars góður rekkjuvinningur. Høvuðsvinningur á lutaseðli: 2 harmonikutúrar fyri tvey. Annars: Olja, bensin, ræstur fiskur, flak, saltkjálkar og gávukort.
Flogbóltsdeildin TB

BINGO
Tvøroyrar Klubbi hevur bingo leygarkvøldið 13. apríl kl. 20.00. Á lutaseðli ein Apex ferðaseðil til Keypmannahavnar.
Nevndin

GOTT MATBINGO
Gott matbingo verður í Pálsstovu 14. apríl kl. 16.00.
Streymastuðlar

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 14.04 kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli: Gávukort frá Smyril Line á 2.500 kr. Eykaspælið 800 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

BINGO
Gott bingo verður í bygdahúsinum á Strondum leygardagin 13/4 kl. 16. Drigið verður millum spølini. Á lutaseðli 15 vinningar. Høvuðsvinningur: Ein vikuskiftisflogferð til DK. Eyka spæl. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kiwanisfelagið Rósan

RISABINGO
til frama fyri ferð til PartilleCup í Sveriki, verður í Ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin 20. apríl kl. 15.00. Nógvir góðir vinningar, m. a. uttanlandsferð.
Foreldrabólkurin

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini onskvøldið 17. apríl kl. 19.30. Full pláta: 300 kr. 10 vinningar á lutaseðli, m.a. 2 ferðir, 500 kr.
Felagið Stóra pakkhús

BÁRUBINGO
Heimabingo fæst til keyps á posthúsum og í sølubúðum um alt landið. Tú sær beinanveg um tú hevur vunnið.
Bygdafelagið Báran í Árnafirði

GOTT BINGO
Verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 15. apríl kl. 19. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á 1.000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

TIL SØLU
N.S. Hansen & H. Marker, Grundbog i biologi I, Økologi kr. 50,- N.S. Hansen & H. Marker, Grundbog i biologi II, Menneskets biologi kr. 50,-, Kemi 2000, C-niveau kr. 100,-, Con César, en spansk kunstners hverdag kr. 50,-Robin Williams, Dead Poets society kr. 30,-, Oscar Wilde, The Importance of Being Earnest kr. 15,-, Jacobsen & Matras, Føroysk-dansk orðabók kr. 40,-, Jóhannes av Skarði, Dansk-føroysk orðabók kr. 40,-, Føroysk Heimsatlas kr. 60,-.
Tlf. 317075

Burturm. /funnið

BURTURMIST
Hevur nakar funnið fartelefon mína, eina gráa Nokia 3330.
Ring tlf. 333843

Býli

TRÚGVANDI MAMMA
við 12 ára gomlum barni ynskir íbúð í Havn. Havi fast arbeiði. Gjaldi rættstundis. Max. 4.000 kr. við øllum.
Tlf. 316219

TIL LEIGU BEINANVEGIN
16 fermetrar stórt verilsi, mitt í býnum.
Tlf. 227003 ella 445178

TIL LEIGU
Skrivstovuhøli til leigu í miðbýnum – 190 fermetrar. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill. mrk. 1318-2

TVØROYRI
Skulu tygum til Suðuroyar og vilja búgva væl, so eru hús í miðbýnum til leigu vikuskifti ella longri. Sera vakurt útsýn yvir Tvøroyrarfjørð.
Tlf. 312205 ella 261560

ÍBÚÐ YNSKIST
Tikomin, friðarlig kvinna ynskir íbúð í Havn, á Hvítanesi, á Argjum ella í Hoyvík. Leggi dent á eitt reint og hugnaligt heim, gjaldi rættstundis. Kann rætta eina hjálpandi hond, t.d. við reingerð.
Tlf. 315613

ÍBÚÐ YNSKIST
Par søkir íbúð í Havn, Hoyvík ella á Argjum. Vit eru friðarlig og fara væl um. Roykja ikki, vit gjalda til tíðina. Um tú kanst hjálpa okkum, so vinarliga ring
tlf. 220819

ÍBÚÐ Í DK
Eg havi eina íbúð mitt í Albertslund at framleiga frá hálvum apríl til hálvan juni, er 88 kvm. til støddar.
Ring 0045 23258096 millum kl. 18-20

ÍBÚÐ Í AALBORG
40 fermetrar íbúð í Aalborg Ø framleigast frá 1/2 apr. til 1. aug.
Telefon. 311513/212000

ÍBÚÐ KÆRKOMIN!
Eg eri ein ungur maður, við føstum starvi í Tórshavn, sum søknast eftir eini fittligari íbúð í høvuðsstaðarøkinum.
Vinarliga ring 265051

HJÁLP!
Íbúð ynskist skjótast gjørligt, vit eru tvey vaksin og eitt barn, ið skal í skúla í summar, íbúðin skal helst vera í Havn ella í Tórshavnar kommunu.
Tlf. 315913

REYKJAVÍK
Kamar til leigu í styttri ella longri tíð. Nærri at vita á
tlf. 5621737 e. kl. 17

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt lesandi par søkir íbúð í Havn. Vit roykja ikki og fara væl um.
Tlf. 255202 ella 262223

HANDILSHØLI TIL LEIGU
Handilshøli uml. 115 fermetrar. Liggur við høvuðsveg, rættiliga góð parkeringsviðurskifti. Vælegnað til handil og/ella skrivstovu.
Tlf. 322070/215570

TIL LEIGU
Frá 1. mai er íbúð til leigu í Hoyvík til fólk ið ikki roykja. Kostnaðurin er 4.500 kr. um mán. Við hita + 1 mán. depositum. Í íbúðini, sum er umleið 50 m2, er køkur og stova í einum, eitt kamar, baðirúm og durur. Hevur hetta tín áhuga, so skriva til
Bill. mrk. 445

EIGARAÍBÚÐ TIL LEIGU
Byggiár 1990, 112 ferm. til leigu. 3 kømur, stova-køkur í einum, gangur, bryggers, 2 wc, durur, 3 seinastnevndu við varma í gólvinum. Íbúðin liggur í stovuhædd við góðum útsýni. Íbúðin er partvís møblerað. Prísuppskot 9.400 kr um mán. + ljós og hita.
Tlf. 313339 Best seint um kvøldið

HÚS YNSKJAST
til keyps í Skopun. Vinarliga ringi
Tlf. 252867

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru tvær 22 ára gamlar læraralesandi, ið leita eftir einari íbúð í høvuðsstaðarøkinum.
Tlf. 222920 ella 222163

KAMAR YNSKIST
Sjómaður í 30-unum ynskir kamar til leigu í Havn. Má hava atgongd til kok og bað.
Tlf. 228009 - 321646-261646

Dýr

TARVSKÁLVAR
Tarvskálvar til sølu.
Tlf. 218101

HVØLPUR
Ein Border Collie tíkahvølpur fæst.
Tlf. 361102

KETTLINGAR
2 sera fittir kettlingar, føddir 5. apríl, kunnu latast um ca. 9 vikur. Annar er hvítur/gráur hin er grástríputur.
Tlf. 254247

LATIN DJÓRAVINI
Fittur 1 ára gamal hundur verður latin til djóravin. Hann er ógvuliga góður við børn, dámar væl at spæla og ganga langar túrar. Ring og hoyr nærri á
tlfd. 421039

HUNDAHVØLPUR
Ein 9 vikur gamal tíkahvølpur verður latin djóravini.
Tlf. 220100 ella 441901

BORDER COLLIE
Ein 20 mðr. gamal ektaður hundur fæst.
Tlf. 214727

HØNUR
Fýra 1 1/2 ára gamlar hønur (ungar frá 1999).
Tlf. 312016

AKVARIUM
Eitt 63 litrar akvarium til sølu. Hitalikam, pumpa, lampa o.a. (plantur, steinar) fylgir við.
Tlf. 316813 e. kl. 18

HUNDAHVØLPAR TIL SØLU
5 hundahvølpar til sølu – undan góðari Border Collie tík.
Tlf. 373578

HUNDAHVØLPAR
undan sera barnavinarligari og friðarligari tík av slagnum Border Collie/seyðahundur. Svartir/hvítir bert til djóravinir – um tvær vikur.
Tlf. 261374

MARSVÍN TIL SØLU
Trý marsvín til sølu.
Tlf. 456787

HUNDAHVØLPUR
Tríggjar mánaðir gamal hann collie hvølpur verður latin djóravini.
Ring 228256

YNSKIST
Hundahvølpur ynskist, helst gul hon av slagnum labrador.
Vinarliga ringið 441656 ella 261900

LJÓSAGRÁUR KETTLINGUR
við onkrum ljósum bletti kann fáast við at avheinta hann. Er reinligur og dugir at eta og leppa.
Tlf. 455412

ÍSLENDSKT ROSS
Íslendskt ross ynskist til keyps.
Tlf. 251473 - 227228

DUNNUR
9 dunnupar til sølu fyri 200 kr. parið. Um tú keypir øll fært tú tey fyri 1000 kr.
Ring 442048 - 250748

Fundir

RÓÐRARFELAGIÐ KNØRRUR
hevur aðalfund 20. apríl kl. 12 í koyriskúlanum hjá Hans J. Hermansen, Stoffalág 82. Allir limir, nýggir og gamlir, eru vælkomnir.
Nevndin

KLAKSVÍKAR DANSIFELAG
Limafundur verður sunnukvøldið 14. apríl kl. 20. Á skránni havleikur 2002. Tilmelding o.a. Dansinátt í Norðurlandahúsinum. Farið verður upp á gólv.
Nevndin

PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN
kemur saman mikukvøldið 17. apríl kl. 19.00 í Losjuni, Tinghúsvegur 18, har vit hava áhugafund við kjaki. Møti fjølment!
Nevndin

FØROYA PRENTARAFELAG
lýsir til limafund í hølum felagsins, Liðagøtu 2, Tórshavn, leygardagin 13. apríl kll. 16.00.Til viðgerðar: Samráðingaruppleggið.
Nevndin

HONDBÓLTSFELAGIÐ NEISTIN
Ársaðalfundur verður í hølum felagsins mikudagin 24. apríl kl. 20.00. Skrá sambært lógum felagsins.
Nevndin

FORELDRAFELAGIÐ AÐALFUND
Mikukvøldið 24. apríl kl. 19.30 hevur Foreldrafelagið aðalfund í Mettustovu í Havn.
Foreldrafelagið

NORÐSTREYMOYAR
HANDVERKARAFELAG.
Ársaðalfundur verður hósdagin tann 18. apríl kl. 17.30 á maskinmiðstøðini í Kollafirði. Um fundurin ikki er viðtokuførur, verður eykaaðalfundur hálvan tíma aftaná.
Nevndin

Húsarhaldstól

FRYSTIBOKS
6 ára gomul frystiboks til sølu fyri 1.000 kr. Er sum nýggj.
Tlf. 319587

KULDASKÁP TIL SØLU
Kuldaskáp av merkinum GRAM KS 200-06 G. Kuldaskápið er ca. 3 ára gamalt, og hevur verið óbrúkt í 2 ár. Til sølu fyri 1.800 kr. Kuldaskápið kostar í dag at keypa nýtt 3.995,-
Tlf. 218099

EYMHETTA TIL SØLU
Zanussi eymhetta til sølu fyri kr. 200,-
Tlf. 316817 e. kl. 18

TIL SØLU
6 pers. uppvaskimaskina til sølu fyri 1.500 kr. vegna keyp av størri.
Tlf. 442198 eftir kl. 18.00

FRYSTIBOKS
Vestfrost frystiboks 250l. til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 314421

Innbúgv

AVHEINTING
Ein briks, stødd 205 x 80 og eitt skrivaraborð stødd 110 x 50 fæst við at avheinta.
Tlf. 448041

TIL SØLU
Tríggjar træ persiennur stødd 120 b. til sølu.
Tlf. 375354

VITRINESKÁP
Eitt vitrineskáp til sølu. Er lútað, stødd 185 cm. høgt og 103 cm. br.
Tlf. 316813 e. kl. 18

TIL SØLU
Stereoanlegg, skrivaraborð, kaffi/te-stell.
Tlf. 319103

SENGUR
Tvær sengur, kunnu nýtast sum dupultsong ella etasju-song ella 2 einkultar sengur – 105 x 200 cm. hvør. Til sølu fyri 900 kr.
Tlf. 321450

SOFASETT 2-1-1
til sølu fyri 3.000 kr. Sofan kann sláast út til dupultsong og ein 3 pers. sofa fyri 300,-
Tlf. 261374

TIL SØLU
Brúktur køkur til sølu.
Tlf. 217972

TIL SØLU
Bláur lenistólur 200 kr. Leðurlook lenistólur við skamli 500 kr. 2 reyðir jarnstólar við pútum, 50 kr. stk. marmor spisiborð 400 kr.
Tlf. 315991 ella 215991

SKÁP TIL SØLU
Skáp. sera væl innrættað við skrivaraborði, hillum og plássi til ymiska skrivstovuútgerð, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 315554

TIL SØLU
Songin er væl viðfarin, hvítt træ, knapt 2 ára gomul. Støddin er 180 x 200 cm. Útskorin galvur við høvda- og fótalagið. Bestu madrassur, og topmadrassin er í einum. Songin er keypt í Idé-húsinum fyri uml. 9.000 kr., alt verður nú selt vegna plásstrot fyri 5.000 kr., ella hægstbjóðandi.
Tlf. 314624 ella 215353

Leikur

SANDKASSI YNSKIST
Hevur onkur ein sandkassa. Helst við loki og møguliga aðrar útileikur at selja, so ring vinarliga
Tlf. 448886

Lutaseðlar

LUTASEÐLAR FYRI 2HF
(ooq) í Hoydølum. Hesi nr. eru drigin: 1) 3224 2) 0142 3) 3690 4) 0819 5) 2500 6) 1540 7) 3289 8) 2225 9) 2774 10) 3875 11) 2602. ooq takkar fyri stuðulin.
2 HF OOQ

LUTASEÐLARNIR
til frama fyri 9.ð. í Eysturskúlanum eru drignir. Nr. eru: 1) 0002, 2) 1729, 3) 1650, 4) 1512, 5) 0363, 6) 0154, 7) 0171, 8) 0085, 9) 1367, 10) 0153. Vinningarnir fáast við at ringja á tlf. 221622, spyr eftir Joan.
Tlf. 221622

LUTASEÐLAR
Tann 05.04.2002 hevur Notarius Publicus fyri Eysturoyar sýslu drigið hesi nummur:1) 2121, 2) 0564, 3) 6445, 4) 7909, 5) 3750, 6) 5966, 7) 4633, 8) 4313, 9) 2303, 10) 6188. Vinningarnir fáast við at ringja á tel. 47 00 00. Tøkk fyri stuðulin!
Føroyska Sjómansmissiónin

HONDBÓLTSFELAGIÐ NEISTIN
14. mars dró Notarius Publicus hesi nummur: 1) nr. 5118 - 2) nr. 6431 - 3) nr. 9250 - 4) nr. 11891 - 5) nr. 8225 - 6) 5558 - 7) nr. 5029 - 8) 10561 - 9) nr. 7958 - 10) nr. 4721. Vinnarnir kunnu ringja á tlf. 211255. Við tøkk fyri stuðulin.
Hondbóltsfelagið Neistin

Pløgg

SKÓTABÚNI YNSKIST
Skótabúni std. 12 ár til KFUM-skótar (grønur) ynskist til keyps.
Tlf. 318269 ella 212173

LEÐURSTYVLAR
Nýggjr, svartir barnaleðurstyvlar við longum leggi og høgum botni, std. 36 til sølu fyri 300 kr. Nýprísur 800 kr.
Tlf. 258715

TIL SØLU
Nýggjar Nike gaggur av slagnum Zoom Air, std. 37 1/2 til sølu fyri 300 kr. (Nýprísur 600 kr.)
Tlf. 258715

Samband

SAMBAND YNSKIST
Trúgvandi einkja í 70'unum søkir samband við ein fittan, edrúiligan mann, sum kanska kennir seg einsamallan, tað geri eg eisini, so er hetta nakað fyri teg, so skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1318-3

SAMBAND
Eri einligur maður í 30-unum, havi fasta inntøku. Eg sakni eina at deila upplivingar og hugna mær við. Er hetta nakað fyri teg, vinarliga send mynd við fyrsta bræví.
Bill mrk. 328

Sjavs

SJAVSKAPPING
Almenn sjavskapping verður á Kafé Blákross týsdagin 16. apríl kl. 19.00.
Kafé Blákross

SJAVSKAPPING
verður á Strondum sunnudagin 14. apríl kl. 18.00. Leikarar millum 4 tey bestu þørini fáa steyp til ognar.
Strálan

Súkklur

MOTORSÚKKLA TIL SØLU
Kawasaki Ninja ZX6R (600cc), árg. 6/95, 100 hk, svørt. Súkklan er í sera góðum standi.
Tlf. 211553

SKUTARI TIL SØLU
Peugeot skutari til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 217972

CROSS TIL SØLU
8 mðr. gomul Aprilia RX50. Onki galið og sær gott út. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 314740

MOTORSÚKKLA TIL SØLU
Ein Suzuki GSX 600F til sølu.
Tlf. 220626

TIL SØLU
Honda skutari, gráur, hevur koyrt 1.800 km. Sera væl viðfarin og er 5 mán. gam